# Klaksvíkingar ganga í blindum

**Hóast KÍ í 2. hálvleiki hevði bóltin væl meiri enn heimaliðið, so var tað NSÍ, sum átti størstu møguleikarnar at gera mál**

NSÍ-KÍ
*Jóannes Hansen*

NSÍ heldur tørn í stríðnum við tey trý á fremstu plássunum, og KÍ hongur fast á niðurflytingar plássinum. Tað eru tølini eftir tætta stríðið í dýrdarveðrinum við Løkin í Runavík sunnudagin.

Upploøgdu málmøguleikarnir kundu teljast á aðrari hondini, og NSÍ átti teir allar. Málið fingu teir, tá ið fyrra umfarið var knappliga hálvrunnið. Talan var ikki um upplagdan málmøguleika, men avrikið var fínt av Páll M. Joensen, sum eftir sigursmál í Fuglafirði og aftur hesa ferð saman við HB og NSÍ hevur gjørt av, at leigumálið skal leingjast, so tað skal fevna um alt hetta kappingarárið.

Møguleikin stóðst av einum av stóru veikleikunum hjá KÍ í hesum kappingarárinum. Klaksvíkingar vóru á veg í álop, tá ið teir mistu í vinstru og á miðjuni. Bólturin vart lagdur fram ímillum til Páll M. Joensen, sum setti ferð á, megnaði at halda mótstøðumenninar aftanfyri seg, og var púra kaldur, tá ið hann av brotsteigar markinum setti framvið Meinardi Joensen, og umvegis tvørtræið small bólturin í vøllin innanfyri málstrikuna.

Hinar báðu risa møguleikarnar átti Ike, sum bæði spældi rættuliga kontant og var støðug hóttan móti ofta kroystu KÍ miðverjuni. Jan Andreasen vísti síni góðu plaseringsevni, men hann varð skjótt darvaður av, at hann fekk gult kort og fleiri ferðir lá á markinum til næsta gula og harvið reyða kortið, og Niclas Niclasen hevði stóra uppgávu móti skjóta Christiani Høgna Jacobsen.

Fyrra førið, har Ike kundi havt skorað, var heilt skjótt eftir einsamalla málið. Eftir horna var álosspælarin nógv hægstur og stútaði úr stuttari fjarstøðu, men Meinhard Joensen megnaði frálíka væl at refleksbjarga til horna.

Hesa løtuna vóru boð orduliga eftir klaksvíkingum. Løtu seinni var miðverjin Óli Hansen hægstur eftir frísparksframlegging, men hann snittaði bóltin dygst omanfyri málið. Seinna førið, tá ið Ike kundi havt avgjørt, var tíðliga í 2. hálvleiki. Klaksvíkingar mistu, tá ið teir royndu at spæla á egnari hálvu, og eftir tvær sneiðingar í brotsteiginum gjørdist Ike púra leysur. Hann smekkaði til, men KÍ málverjin tveitti seg niður og fekk onkursvegna parera við beinunum.

NSÍ hevði lítla lotið undan í 1. hálvleiki, og tá ið teir høvdu fingið málið, vóru teir fitta løtu omaná. Helgi L. Petersen og Jústinus R. Hansen arbeiddu væl á sentrala miðvøllinum, og í einstøkum førum komu bóltarnir innfyri frá Páll M. Joensen og Andy Olsen, men uttan at serliga upplagdir møguleikar spurdust burturúr.



*Tað gongur illa hjá KÍ, sum mátti leggja rygg til enn eitt tap*

### Eingin broddur

Serliga eftir steðgin sýndu klaksvíkingar góðan hugburð, og tað sást ikki á avrikinum úti á vøllinum, at teir eru botnlið. Burtursæð frá møguleikanum, sum Ike tíðliga fekk, so megnaði KÍ at varðveita bóltin stórar partar av tíðini. Teir vóru ágrýtnir, og teir vunnu nógvar nærdystir, men á síðsta fjórðinginum á vøllinum var ikki broddur í.

Heðin á Lakjuni og Arnhold Joensen í borðunum saman við teimum trimum sentralu á miðvøllinum løgdu fleiri ferðir innfyri, men tað var ikki nóg stór tyngd í, og tá ið mest um galt, var hugflogið ikki nóg stórt at spæla seg til møguleikar og fáa bóltin inn um Jens Martin Knudsen, sum heilt sjáldan varð settur á serligar royndir.

Hjalgrím Elttør royndi, men hann var ofta rættuliga einsamallur, og NSÍ verjan hevði tak á honum, tá ið hann royndi at draga framvið teimum.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki vórðu Ovi Nysted og Kristoffur Jacobsen settir á vøllin í roynd at leggja eyka trýst á. Klaksvíkingar stútaðu onkra ferðina á Jens Martin Knudsen, og bæði Heðin á Lakjuni og Atli Danielsen høvdu ikki so lítið vandamiklar frísparksroyndir.

Fram ímóti dystarenda gjørdist tað heldur enn ikki órudduligt og trongt og gnaddið og illneitingin var ikki serliga dámlig. Nærdystirnir vóru nógvir og tættir, tá ið KÍ flutti Niclas Niclasen og síðani Símun Joensen fram á toppin. Stutt undan leikloki sendi dómarin Ike av vøllinum, tí hann skuldi hava kastað seg í krovið á einum Niclasi Niclasen, sum endaði á Landssjúkrahúsinum.

Men KÍ megnaði ikki stuttu løtuna, teir vóru fleiri enn mótstøðumenninir, at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Eftir innlegg úr høgru og tvørtur um hevði Harley Bertholdsen roynd úr spískum, sum kitlaði tvørtræið, áðrenn bólturin fór út til málspark. Men tað var alt ov lítil broddur og tyngd í álopspartinum hjá KÍ. Hugflogið restaði á síðsta fjórðinginum, og NSÍ verjan var málrættað og gjørdi ikki persónligu mistøkini, sum kanska kundu havt givið botnliðnum úr Klaksvík møguleika at javna.

## Fakta um dystin

**NSÍ-KÍ 1-0 (1-0)**
**1-0:** Páll M. Joensen 19.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Viggo Johannesen, Óli Hansen, Jónstein Petersen - Páll M. Joensen (Dánial Hansen, 62.), Helgi L. Petersen, Jústinus R. Hansen, Andy Olsen - Christian Høgni Jacobsen (Kári Hansen, 75.), Ikechukwu Onyema
**Gult kort:** Jústinus R. Hansen, Kári Hansen
**Reytt kort:** Ikechukwu Onyema 86.
**KÍ:** Meinhard Joensen - Leon Bjartalíð, Jan Andreasen, Niclas Niclasen (Tórður Lervig, 86.), Harley Bertholdsen - Atli Danielsen, Høgni Madsen, Símun Joensen - Arnhold Joensen (Kristoffur Jacobsen, 68.), Hjalgrím Elttør (Ovi Nysted, 68.), Heðin á Lakjuni
**Gult kort:** Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Símun Joensen

# Súni aftur á grasinum

**Feløgini, sum hava føroyskar spælarar í hópinum, eru eftir fýra tey fyrstu umførini á teimum báðum aftastu plássunum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Í gjár fór Súni Olsen undir aftur venjingarnar í Aalborg, eftir at hann hevur verið í Føroyum og hjálpt GÍ at vinna steypakappingina, og eftir at hann seinastu vikurnar hevur verið plágaður av liðbandsskaða.

Um Súni Olsen fer at verða úttikin til avbjóðingina, tá ið AaB sunnudagin fer at fáa vitjan av Esbjerg, er ivasamt. Men tað er stig rætta vegin, at Súni nú fer aftur at venja, og so verður tað upp til landsliðsvenjaran undir venjingunum í næstu viku at gera av, um hann er nóg væl fyri at spæla landsdyst mikukvøldið í næstu viku.

AaB tykist treingja til alla ta hjálp og tann stuðul, sum tað ber til at fáa fatur á. Eftir fýra tey fyrstu umførini hava teir í Aalborg bara fingið eitt stig. Hesa ferð var bitin stórur, men tað eydnaðist kortini AaB í 1. hálvleiki at leggja seg á odda 1-0 í Brøndby, og um tað hevði viljað væl við, so høvdu teir eisini økt til 2-0. Men Brøndby kom fyri seg aftur, og í 2. hálvleiki skoraðu teir trý mál og vunnu 3-1.

Hin føroyski landsliðsspælarin í superliguni er Johan B. Hansen. Leikluturin hjá honum hevur higartil í hesum kappingarárinum verið rættuliga avmarkaður. Hesa ferð spældi Horsens á útivølli móti FCM, sum B36 skal takast við hóskvøldið. Heimaliðið vann 2-1, og Johan B. Hansen var ikki á vøllinum.

Fyri Horsens var dysturin søguligur á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin, at teir fingu mál í superliguni. Horsens er aftast við einum stigi. Tað fingu teir næstsíðsta vikuskifti, tá ið tað eydnaðist teimum at spæla málleysan javnleik á heimavølli móti OB.

Tað vóru teir í OB vónsviknir av, og teir vóru ikki minni vónsviknir sunnudagin, tá ið tað heldur ikki eydnaðist at megna meiri enn málleysan javnleik. Hesa ferð var tað á heimavølli móti FCN.

Eisini hjá Esbjerg hevur tað verið strevið tær fyrstu vikurnar av nýggja kappingarárinum. Sunnudagin glapp orduliga, tá ið vesturjydarnir sendu Silkeborg norður aftur við 4-0 tapi í viðførinum.

Í toppinum hevur umframt Brøndby eisini Viborg fingið fulla úrtøku í fýra teimum fyrstu umførunum. Hesa ferð vunnu teir grønu 3-1 á heimavølli móti uppflytarunum SønderjyskE.

FCK misti fyrstu stigini sunnudagin. Teir høvdu vitjan av AGF, sum vann fyrsta stigið í ár í 1-1 javnleikinum. FCK legði seg á odda og hevði fleiri góðar møguleikar at økja um leiðsluna. Tað eydnaðist ikki, og so tornaði tað soleiðis út, sum tað so ofta ger. AGF javnaði, og í síðstu løtu høvdu teir møguleika at gera sigursmálið. Men tað hevði verið mest sum ov nógv av tí góða!

Í vikuskiftinum verður fimta umfarið á skránni. AFG og OB skulu spæla leygardagin, og sunnudagin sær skráin soleiðis út: AaB-Esbjerg, Silkeborg-Viborg, SønderjyskE-FCK, FCN-FCM og Horsens-Brøndby.